


*Christian R. Mouritsen hevur skriva undir sáttmála við íslendska Val, ið hevur fyrrverandi HB Venjarin, Kristján Guðmundsson, við róðrið*

# Christian vil røkka dreyminum

**FÓTBÓLTUR** Christian Mouritsen fer nú aftur at royna eydnuna sum yrkisleikari uttanlands. Hann og Pól Jóhannus Justinussen skrivaðu undir við íslendska Val í gjár

Uni Holm Johannesen

Havnarmaðurin, sum fyrr hevur verið knýttur at ungdómsdeildini hjá Manchester City, hevur framvegis ikki slept dreyminum um at eina yrkisleið sum fótbóltsspælari uttanlands.

Hann vónar, at skiftið til íslendskan fótbólt er eitt stig á leiðini.

– Ætlanin er framvegis at sleppa so langt sum tilber. Eg havi hug at royna okkurt nýtt, og tað er ein avbjóðing at spæla í íslendsku kappingini, sigur Christian Mouritsen og vísir á, at hann kann menna seg nógv kropsliga, tí íslendingar raðfesta tann partin høgt.

Kristján Guðmundsson, sum fyrr í ár var venjari hjá HB, stendur á odda fyri Vali.

– Hann hevur sæð meg spæla í Føroyum, og nú vil hava hann meg við sær til Íslands. Tað er bara positivt, sigur Christian Mouritsen.

Miðvallarin skifti úr HB til B36 í summarsteðginum í 2009, har hann hevur spælt síðan.

Christian Mouritsen skeyt sítt fyrsta landsliðsmál í september, tá Føroyar taptu 1-5 fyri Slovenia á útivølli.

*uni@sosialurin.fo*



*Jon Hestoy, formaður í Svimjisambandinum*

*savnsmynd*

# Runavík skal hava ein svimjihyl

**SVIMJING** Jón Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, heldur, at tað er skomm fyri Runavík, at kommunan ikki hevur ein svimjihyl at bjóða børnunum

Uni Holm Johannesen

Tað er skomm, at Runavík, sum triðstørsta kommunan í landinum, ikki hevur ein svimjihyl.

Tað heldur Jón Hestoy, sum er formaður í Svimjisambandinum.

Hansara greiða sannføring er, at tað er ein stórur trupulleiki, at kommunan ikki hevur nøktandi tilboð at læra børnunum at svimja.

Hann vísir á, at tað kann vera ein spurningur um lív og deyða, um tú ikki dugir at lívbjarga tær á sjónum.

– Hagtølini staðfesta eisini væl og virðiliga, at børn, sum hava lætta atgongd til ein svimjihyl, duga munandi betri at svimja enn børn, sum hava langan tein til ein svimjihyl. Tað er ikki nøktandi, at Runavík kann bjóða hesa tænastuna, sigur Jón Hestoy við Rás2.

**Borgarstjórin skilir**

Magnus Rasmussen er borgarstjóri í Runavík.

Hann sigur, at Runavíkar kommuna hevur frálíkt samstarv við Nes kommunu um, at skúlabørnini upp til fjórða flokk sleppa at svimja hjá teimum. Men aftaná eru eingin tilboð.

Hann skilir atfinningarnar hjá Jón Hestoy.

– Tað er sjálvsagt ein trupulleiki, at børnini ikki kunnu svimja í kommununi, viðgongur Magnus Rasmussen.

Borgarstjórin sigur, at tað hevur prátað um ein svimjihyl í fleiri ár.

Men ein svimjihylur verður ikki reistur í Runavík í bræði.

– Tað er fíggjarliga orkan ikki til, staðfestir Magnus Rasmussen.

**Svimjisambandið hjálpir ikki**

Jón Hestoy veit væl, at tað er ikki ein avgreiðsluspurningur at byggja ein svimjihyl.

Hann heldur framvegis, at Runavíkar kommuna skuldi loyst trupulleikan fyri fleiri árum síðan.

Svimjisambandið hevur ongan møguleika at stuðla slíkari verkætlan.

– Vit eiga ongar pengar, so Runavík noyðist at fíggja svimjihylin við lokalum ella almennum pengum, sigur Jón Hestoy.

Hann leggur afturat, at tað hevði sjálvsagt havt týdning fyri føroyska svimjing, um triðstørsta kommunan í landinum hevði eina svimjihyl.

Men tað týdningarmesta er, at børnini læra at svimja fyri at kunna bjarga sær á sjónum, sigur hann.

# Nøgdir føroyingar í Moskva

**SVIMJING** Hóast tíðin var eitt vet frá tíðini, tá Pál Joensen vann silvur í somu grein í Berlin um vikuskiftið, eru Jón Bjarnason og Pál Joensen nøgdur við tíðina í 400 metra frí í World Cup í Moskva í gjár

Uni Holm Johannesen

Tað boðar Svimjisambandið frá.

Ætlanin var hesaferð ikki at leggja eins nógv fyri sum móti Paul Biedermann í Berlin, men heldur fylgja við rúgvi, og síðan svimja við fullari megi seinastu metrarnar. Tað er ein liður í venjingunum hjá Páli at verða betur til spurtirnar.

Tað riggaði væl. Pál Joensen var nummar fýra aftaná fyrstu 50 metrarnar, og vendi sum nummar seks av átta á teimum 200 metrunum.

Síðan setti hann ferðina upp, vann hinar aftur, og á seinastu 50 metrunum hevði hann lagt allar aftur um seg.

Tíðin var 3:45.56.

Jón Bjarnason sigur, at tíðin er nøktandi. World Cup-stevnan er samstundis úttøkustevna hjá russum til heimsmeistarastevnuna í Dubai, og tað verður ongantíð lætt at vinna á russum, tá fleiri dúva upp á hesa stevnuna.

Pál venur í grundin bara til kappingar, meðan hann venur tungt í pausunum.

Rókur í Jákupsstovu upplýsir, at tað loysir seg væl fíggjarliga at vinna slíkar kappingar. Pál Joensen hevur við gullinum í dag tryggjað sær 1500 dollarar.

*uni@sosialurin.fo*